tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 29.02.2024 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, ~~Jónleyg Jespersen Bech~~, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Eyð Eidesgaard

Varalimir:

Ikki møtt: Jónleyg J. Bech, fráboðað

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 3/24 | 21/00084-90 | Liðugerð av havnarhylinum á Tvøroyri |
| 4/24 | 24/00056-3 | SEV -ynskið/umsókn um kaðalgrevstur undir Heygnum 2024 |
| 5/24 | 24/00057-2 | Vegagerð -íbinda Heiðarveg við vøllin á Sevmýri |
| 6/24 | 24/00053-2 | Mýrifípan -Tilmælið um at barnagarðurin lukkar um summarið, í tríggjar vikur. |
| 7/24 | 24/00048-2 | TB-Fótboltur umsókn um stuðul til kappingarárið 2024 |
| 8/24 | 21/00460-2 | FSR -umsókn um stuðul til bygging av nýggjum neysti á Hvítanesi |
| **Til kunningar** | | |
| 4/24 | 24/00004-1 | Skattatøl 2024 |
| 5/24 | 24/00026-2 | GIGNI -kunning um heilsufrøðingin í Tvøroyrar skúla |
| 6/24 | 24/00066-2 | Arbeiðsbólkurin er nú komin á mál við álitinum um kommunusamanlegging – fyrimunir og vansar, og heitir á borgarstjórar um at skipa fyri kunning |
| | | |

Kristin Michelsen lesur skránna til býráðsfundin í dag og kunnar um, at enn eitt mál 6/24 er komið á skránna í dag, spurt verður til um viðmerkingar eru til skránna. -ongin viðmerking.

**Til støðutakan**

**3/24**
**21/00084-90 Liðugerð av havnarhylinum á Tvøroyri**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 17.01.2024 | 4/24 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 07.02.2024 | 8/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 12/24 |
| 4 Býráðið | 29.02.2024 | 3/24 |

**Málslýsing:**
MTV er um at vera liðug við at gera træ-arbeiðið á suðursíðuni.

**Tilmælið:**
Støða skal takast til framhaldið av arbeiðnum – serliga við atliti til girðing móti bingjuøkinum. Samlaði uppskotið hjá BRIM verður mett at kosta omanfyri 5 mill. kr.

**Vinnu- og havnanevndin 17. januar 2024:**
Tekniska deild arbeiðir við uppskoti til ein minni tænastubygning, sum inniheldur alment handikapp-vesi við inngongd beint útifrá, vesi og brús, umframt hentleikar til vasking, og ein lítlan te-køk.

Kostnaðarmeting verður innheintað uppá at gera ein betongmúr, sum kann vera fyrsta byggistig í verkætlanini, sum m.a. hevur til endamáls at fríðka um økið.

**Vinnu- og havnanevndin 07. februar 2024:**
Nevndin hevur fingið fylgjandi kostnaðarmeting uppá at gera ein betongmúr frá MTV-Byggivirki: Tilsamans 394.750,00 uttan MVG

Nevndin ynskir at ein fastan prís uppá at gera múrin, íroknað nýggjar inngongdir til el-húsini á kaiini. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Tekniska deild 22. februar 2024:**
Vit hava fingið nýggja tekning og tilboð frá MTV: kr. 484.750,00 u/MVG
Mælt verður til at taka av tilboðnum.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
MTV byggivirkið hevur hin 08.02.2024 latið teknisku deild tilboð uppá ger av avbyrgingarmúri móti bingjuøkinum fyri kostnað á kr. 484.750,- .Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at tikið verður av hesum tilboð, og at hetta verður fíggja av §721 «íløga bátahavnin». Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Forkv. í vinnu- & havnanevndini greiðir frá, hvørjar ætlanir eru at fremja og mælir til at arbeiði verður framt samb. tilboð frá MTV. Einmælt samtykt tilmælið hjá teknisku nevnd og fíggjarnevndini.

**4/24**
**24/00056-3 SEV -ynskið/umsókn um kaðalgrevstur undir Heygnum 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 19.02.2024 | 14/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 13/24 |
| 3 Býráðið | 29.02.2024 | 4/24 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 14.02.2024)**
SEV hevur vent seg til Tvøroyrar kommunu, fyri at fáa graviloyvið til háspenningskaðal millum Akurgerði og vestur eftir vegnum undir Heygnum. SEV hevur skund tørv at fáa hetta arbeiði framt, við tað at brek er komið á sjógvkaðalin, ið liggur tvørtur um fjørðin frá Byrgishavn, sum veitur el til stóran part av Tvøroyri.

Verkætlanin viðførur at NET kemur at at luttaka við leggjan av fibur samskiftiskaðlar til heimini.

Tilmæli hjá teknisku deild er, at kommunan luttekur við at min. Leggja spillvatnsleiðin Ø400 í grøvina, har hvørt húsarhald verður íbundin, og at støða verður tikin til gøtuljós og vatnleiðingar, eftir tørvsmeting, meðan arbeiði fer fram.

Eisini mælir tekniska deild til, at umsitingin fær heimild at samskiftir við eigarar har vegurin er smalast [*millum undir Heygnum 27 og Café MorMor]* fyri at hoyra teirra sjónarmið um evt. at breiðka vegastrekkið undir Heygnum, við at flyta/burturbeina garðar, ið standa upp at vegnum.

Umsitingin mælir býráðnum til, at tekniska deild fær heimild at samráðast við eigararnir av lendinum, sum farast skal ígjøgnum, og at tekniska deild, fær heimild til at gjøgnumføra hesa vegagerð.

Umsitingin mælir til at fáa heimild til at:
1. Samráðast við eigarar av lendi, har ætlanin er at breiðkað vegin undir Heygnum, samb. viðlagda kortskjal.
2. Ognartaka lendi til vegagerð samb. heimild í §12 í Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. Mars 2022.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. Mars 2022

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2024 , ongin nágreina avseting er til hesa vega breiðkan, og krevur tí eykajáttan. -Mælt verður til at fíggja verkætlanina av §625 bygging og løguframleiðsla.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið teknisku nevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Tekniska nevnd 19. februar 2024:**
Form. í teknisku nevnd mælir nevndini til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku deild, at samráðast við eigarar av lendi, har ætlanin er at breiðkað vegin undir Heygnum, samb. viðlagda kortskjal. Og um mett neyðugt, at ognartaka lendi til vegagerð. Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá teknisku nevnd. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá tekniskunevnd og fíggjarnevndini.

TVØROYRAR KOMMUNA

**5/24**

**24/00057-2 Vegagerð -íbinda Heiðarveg við vøllin á Sevmýri**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 19.02.2024 | 15/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 14/24 |
| 3 Býráðið | 29.02.2024 | 5/24 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 14.02.2024)**
Nú SEV hevur skund tørv, at grava nýggjan SEV háspennings kaðal úr grótbrotinum undir Akurgerði og vestur eftir vegnum undir Heygnum, vil hetta viðføra, at vegurin undir Heygnum verður stongdur í eitt longri tíðarskeið, og umstøðurnar hjá borgarum at ferðast millum Froðba og Tvøroyri vera skerdar munandi.

Fyri at lætta um hesa støðuna, verður mælt til, at vegurin, ið gongur vestur gjøgnum Heiðarnar, verður gjørdur farbarur og íbundin landsynningshornið á vøllin á Sevmýri. Haðani førast fram við vøllinum og íbindast Tjaldursveg/Sevmýri. Talan er um vegagerð, sum er byrja fyri fleiri árum síðani, men enn ikki er gjørd liðug.

Talan er um uml. 250 metrar sum í resta, og hevur umsitingin fingið tilboð frá veitara, sum kann gera vegin farbaran fyri kr. 1.25 mió. *(hetta tó uttan asfaltering, gøtuljós og leiðingar)*. Hetta verður mett av teknisku deild, sum verandi lágur kostnaður, tá slíkt vegarbeiði vanl. Liggur hægri enn 10.tkr/m.

Onnur grundgeving fyri at liðugt gera vegin er, at hesin vil betra munandi um atkomuna millum Froðba og Tvøroyri, eins og bústaðarøki B1 liggur upp at vegnum.

Umsitingin mælir býráðnum til, at tekniska deild fær heimild at samráðast við teir 4 eigararnir av lendinum, sum farast skal ígjøgnum, og at tekniska deild, fær heimild til at gjøgnumføra hesa vegagerð.

Umsitingin mælir til at fáa heimild til at:

3. Samráðast við eigarar av lendi, har vegurin verður lagdur, um at fremja ognarbýti eftir viðlagda kortskjal.
4. Ognartaka lendi til vegagerð samb. heimild í §12 í Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. Mars 2022.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. Mars 2022

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2024 , ongin nágreina avseting er til hesa vegagerð, krevur tí eykajáttan. - Mælt verður til at fíggja verkætlanina av §625 bygging og løguframleiðsla.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið teknisku nevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Tekniska nevnd 19. februar 2024:**
Form. í teknisku nevnd mælir nevndini til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku deild, at samráðast við eigarar av lendi, har vegurin verður lagdur, um at fremja ognarabýti eftir viðlagda kortskjal. Og um mett neyðugt, at ognartaka lendi til vegagerð. Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá teknisku nevnd. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá tekniskunevnd og fíggjarnevndini.

**6/24**
**24/00053-2 Mýrifípan -Tilmælið um at barnagarðurin lukkar um summarið, í tríggjar vikur.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 15.02.2024 | 4/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 11/24 |
| 3 Býráðið | 29.02.2024 | 6/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 28. Juni 2023**
Leiðarin av Mýrifípuni, Kari Joensen hevur sent umsitingina tilmælið um, at barnagarðurin Mýrifípan stongir í 3 viku um sumrarnar.

Tilmæli hjá leiðaranum av barnaansingini.

*Mælt verður til at barnagarðurin lukkar um summarið, í tríggjar vikur. Frítíðarskúlarnir hava longur opið enn skúlin, til hálvan juli. Mælt verður til at barnagarðurin eisini lukkar hálvan juli og 3 vikur fram.*

*Vanliga so er summarferiu-ansingin frá seinast í juni og til skúlin byrjar aftur í august uml. 8 vikur. Summarferiu ansing merkir at børnini ikki altíð eru á stovuni har tey vanliga ganga, tað kunnu eisini vera starvsfólk frá aðrari stovu, sum taka ímóti ella er á stovuni tá børnini fara heim. Hetta ger, børn og vaksin ótrygg tá tey koma á stovnin og tað er ofta stór ónøgd frá foreldrum um tað.*

*Um barnagarðurin lukkar í tríggjar vikur verður m.a. summarferiuansingin stytt til 4 vikur.*

**Lógargrundarlag:** *Løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018 1)*
*§ 3. Kommunan kann geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt og hevur ábyrgdina fyri virkseminum. Dagstovnur sambært hesi lóg er vøggustova, barnagarður, frítíðarheim o.a. Dagrøkt sambært hesi lóg er ansing av børnum í heiminum og á spælistovum.*
*Stk. 2. Dagstovnar og dagrøktir hava opið gerandisdagar í dagtímunum, men kommunan kann eftir tilmæli frá barnaverndarnevndini geva loyvi til, at dagstovnar kunnu hava opið alt samdøgrið ella í vikuskiftunum*
*Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um námsfrøðiliga stevnumiðið, starvsfólkasamanseting og virksemið á dagstovnum og dagrøktum.*

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 15. februar 2024:**
Kari Joensen, leiðari av barnaansingini møtti til fundin og greiddi frá um tilmælið at barnaansingin stongir lukkar hálvan juli og 3. vikur fram um sumrarnar. Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá leiðaranum av barnaansingini, sum eina roynd komandi summar 2024.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Sosialu nevnd, at barnaansingin stongir hálvan juli og 3. vikur fram um sumrarnar. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Eyð Eidesgaard og Anita Vibergsdóttir mæla til at beina málið aftur í sosialu nevnd, einmælt samtykt.

**7/24**

**24/00048-2 TB-Fótboltur umsókn um stuðul til kappingarárið 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 19.02.2024 | 8/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 15/24 |
| 3 Býráðið | 29.02.2024 | 7/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 09.02.2024**
André Dalfoss, form. í Tvøroyrar Bóltfelag TB, hevur umvegis teldupost sent umsitingini umsókn um peningarstuðul til fóltbóltsárið 2024.

Form. skrivar í umsóknini m.a:

> *Hóast vit eru í næstbestu deildini í ár, so krevur tað fitt av fíggjarligum rásarúmi at reka felagið og tað er okkara inniliga vón, at Tvøroyrar kommuna eisini í ár vil veita Tvøroyrar Bóltfelag fíggjarligan stuðul.*
>
> *Um Tvøroyrar kommuna enn einaferð vísir okkum vælvild og stuðlar Tvøroyrar Bóltfelag, so hava vit ítøkiligar ætlanir við parti av stuðlunum. Vit ætla at gera ymsar ítróttarligar íløgur við Stórá, til gagns hjá øllum sum venja og eru um økið við Stórá.*
> *Tað hevði glett okkum almikið, um stuðulsupphæddin var áleið sama støðið,sum undanfarin ár.*
>
> *Fyri raksturin av felagnum og fyri at byrjanin av árinum skal ganga so smidliga sum gjørligt, vildi tað verið okkum ein kærkomin hjálp, um eventuellur fíggjarligur stuðul frá Tvøroyrar kommunu kundi verið útgoldin heilt, ella lutvíst í mars mánaði.*

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2024 §524, Stuðul til ítrótt er avsett kr. 1.3 mió.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 19. februar 2024:**
André Dalfoss, form. í TB greiddi frá umsóknini um stuðul og yvirorðnað um ætlanir fyri kappingaráðið 2024. M.a var kunna um at 137 børn eru knýtt at felagnum TB. Markus Thouberg venjari, greiddi meira nágreiniliga frá um ætlanir, spælara toymið v.m. Gilli Sørensen greiddi frá, týdningin at verða um ungu spælarar og at byggja upp egna ungdóm. Kunna var um at felagshúsið manglar útbúnað til endur-venjingar, upptøkutól til skipan og eftirmeting av venjingum, atgongd til media, fyri í felag kunna fylgja við altjóða fótbólti.
Form. í mentanarnevndini mælir til, at lata í fíggjarligum stuðli kr. 400.000,-, har 15% verður oyramerkt til ungdómsarbeiði, har 1/2 verður útgoldin beinanvegin og restin í 4 ratum á kr. 50.000,- (apr., juni, aug., okt.) Einmælt samtykt -málið verður beint í fíggjarnevndina

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**8/24**
**21/00460-2 FSR -umsókn um stuðul til bygging av nýggjum neysti á Hvítanesi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 57/21 |
| 2 Býráðið | 28.10.2021 | 55/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 74/21 |
| 4 Býráðið | 25.11.2021 | 69/21 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 9/24 |
| 6 Býráðið | 29.02.2024 | 8/24 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 20.05.2021)**
Umsitingin hevur í eina tíð samrátt við nevndina í FSR Froðbiar Sóknar Róðrarfelag, um bygging av nýggjum kappróðrarneysti á Hvítanesi. Stuðulsavtala er gjørd, sum verður løgd fyri aðalfund í FSR til samtyktar 24. Nov. 2021, og um samtykt á aðalfundi hjá FSR verður henda eftirfylgjandi løgd fyri Tvøroyrar býráð til samtyktar.

Stuðulsavtalan er í 14. punktum. Samlaði byggikostnaðurin er kr. 10.320.000,- ex. mvg. Tvøroyrar kommuna stuðlar við kr. 6.5 mió. ex. mvg. Lokale og Anlægsfonden stuðlar við kr. 3.8 mió.

**Lógargrundarlag: kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Borgarstjórin kunnar um, at aðalfundur hevur verði í FSR 24. okt., og hevur aðalfundurin samtykt stuðulssáttmálan við Tvøroyrar kommunu. Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at býráðið samtykkir stuðulssáttmálan sum fyriliggur. Fíggarnevndin mælir einmælt til, at FSR og Tvøroyrar kommuna áseta ein av fyrst komandi døgum, eftir býráðsfundin 28. nov., har spakin verður ísettur til bygging av nýggjum kappróðrarneysti.

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini at stuðla FSR samb. fyriliggjandi stuðulssáttmála.

Val av limum í bygginevndina umboðandi Tvøroyrar kommunu.
Alvi Mortensen skjýtur upp at Jónleyg J. Bech og Kristin Michelsen vera fastir limir.
Jónleyg Jespersen Bech skjýtir upp at Alvi Mortensen verður varaumboð fyri Jónleyg Jespersen Bech og at Anita Vibergsdóttir verður varaumboð fyri Kristin Michelsen

Kristina Roest skjýtur upp at Bjarni Hammer verður fastur limur. Súsanna Bertholsen skjýtur upp, at vara umboð fyri Bjarna Hammer verður Kristina Roest

**Kommunustjórin 04.11.2021**
Kommunustjórin og fíggjarleiðarin mæla til, -nú stuðulsavtalan millum Tvøroyrar kommunu og Froðbiar Sóknarróðrarfelag FSR er endaliga samtykt og undirskriva av báðum pørtum-, at stuðulsjáttanin, ið er avsett á FÆ2021, §525 á kr. 1.500.000,- verður flutta á depotkonto hjá FSR.

**Fíggjarnevndin 18. november 2021:**
Einmælt samtykt at stuðulin til FSR verður fluttur á depotkonto hjá FSR

**Býráðið 25. november 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini frá 18. november 2021

**Kommunustjórin 3. februar 2024:**
Borgarstjórin ynskir at viðgerða skriv frá FSR dagf. 2. feb. 2024, ið nevndin í FSR hevur sent øllum býráðslimum og umsitingini.
Hetta er grunda á, at byggitíðin av nýggja neystunum dregur út, kostnaðurin økist, samstundis tørvar kommunan ræðisrættin yvir gamla neysti á Tippinum.

Samb. stuðulsavtaluni har kommunan hevur samtykt verkætlanarstuðul til bygging av kappróðrarneysti er m.a. ásett:

- §1,e) Samb. telduposti sendur til Tvøroyrar kommunu frá FSR, hin 10. Juni 2021 verður samlaði byggikostnaðurin kr. 10.320.000,- u/mvg. Og stuðuls kostnaðurin hjá Tvøroyrar kommunu kann í mestalagið vera kr. 6.500.000,-. U/mvg.
- §8.) FSR avhendar endaliga og løgliga gamla kappróðrarneystið staðsett á Tippinum matr. nr. 532e og 770b uttan kostnað til Tvøroyrar kommuna, tá hesin sáttmáli er undirskrivaður og góðkendur á aðalfundi í FSR. b.) FSR fær fullan nýtslurætt til gamla kappróðrarneysti umframt tey 3 gomlu neystini á Tippinum. Hesin rættur fellur tó burtur, tá nýggja neystið á Hvítanesi stendur liðugt eftir verandi og góðkendum byggitekningum.

Nevndin í FSR gerð vart við í skrivinum dagf. 2. feb. 2024, at FSR ynskir ikki, avhenda endaliga og løgliga gamla kappróðrarneystið staðsett á Tippinum matr. nr. 532e og 770b uttan kostnað til Tvøroyrar kommuna, uttan so, at Tvøroyrar kommuna letur FSR kr. 4,0 mió., í endurgjaldi afturaft latnum stuðuli á kr. 6,5 mió. til nýggja neysti.

Nevndin í FSR grundar hetta m.a. á, at nýggja neysti ikki stendur liðugt, og metur, at tað ber ikki til at byggja liðugt fyri verandi stuðul frá Tvøroyrar kommunu. FSR ynskir sostatt, at Tvøroyrar kommuna økir stuðulin við kr. 4.0 mió, svarandi til eina øking á 62%. Tvøroyrar kommuna letur sostatt í stuðul kr. 10,5 mió. til bygging av nýggja neystinum.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Borgarstjórin staðfestur, at Tvøroyrar kommuna hevur hildið allar ásetingar í stuðulsavtaluni millum Tvøroyrar kommunu og FSR, og borgarstjórin mælir til, at ásetingin í §8 *«Mótrokning»* fær fult og heilt gildið pr. 1. mars 2024, soleiðis at Tvøroyrar kommuna fær endaliga og løgliga gamla kappróðrarneystið staðsett á matr. nr. 532e og 770b uttan kostnað, og at nýtslurætturin til tey 3 gomlu neystini á Tippinum fellur aftur til Tvøroyrar kommunu 1. mars 2024. -einmælt samtykt.
Málið verður beint í býráðið

**Býráðið 29. februar 2024:**
Bjarni Hammer mælir til at nevndin í FSR skal hoyrast samsvarandi tilmælið hjá fíggjarnevndini 22. feb. 2024, áðrenn endalig avgerð verður tikin.
Fyri eru: Bjarni Hammer og Eyð Eidesgaard
Ímóti: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen
Blankt: Kristina Roest
**Uppskoti fallið.**

Anita Vibergsdóttir mælir til at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini, og at FSR fær trygd fyri framhaldandi loyvið til at venja í ítróttardeplinum við Stórá, inntil flutt verður inn í nýggja neystið á Hvítanesi.
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Kristina Roest og Eyð Eidesgaard
Ímóti: Bjarni Hammer
Blankt: ongin
**Uppskotið samtykt.**

**Til kunningar**

**4/24**
**24/00004-1 Skattatøl 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 2/24 |
| 2 Býráðið | 29.02.2024 | 4/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.02.2024**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2023/2024

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2024/2025

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**5/24**
**24/00026-2 GIGNI -kunning um heilsufrøðingin í Tvøroyrar skúla**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 15.02.2024 | 3/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 4/24 |
| 3 Býráðið | 29.02.2024 | 5/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 22.01.2024**
Umsitingin hevur hin 19. Jan., móttikið kunning frá GIGNI, um at vitkandi heilsufrøðingurin í skúlanum gevst tann 1. Feb2024. Sagt verður frá at, heilsufrøðingurin hevur valt at fara í annað starv. Hetta, tí hon arbeiðir við at fáa sær royndir, sum krevjast fyri at kunna útbúgva seg til heilsufrøðing, og hetta gleðast vit um.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 30. apríl 2018

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 15. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**6/24**
**24/00066-2 Arbeiðsbólkurin er nú komin á mál við álitinum um kommunusamanlegging – fyrimunir og vansar, og heitir á borgarstjórar um at skipa fyri kunning**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 29.02.2024 | 6/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 28.02.2024**
Borgarstjórin hevur hin 27.02.2024, móttikið teldupost frá form. í arbeiðsbólkinum, Róin Schrøder, sum er settur at kanna fyrimunir og vansar við kommunusamanlegging.

Kunna verður m.a. um í skrivinum frá arbeiðsbólkinum at:

> *Arbeiðsbólkurin er nú komin á mál við álitinum um kommunusamanlegging – fyrimunir og vansar. Álitið er til rættlestur í løtuni og verður væntandi klárt at seta upp og prentast síðst í hesi vikuni.*
>
> *Vit mæla til, at álitið verður fyrst handað borgarstjórum, ið fáa eina framløgu av arbeiðsbólkinum. Beint eftir hesa framløgu verðru verkstova við framløgu, spurningum og kjaki í Salt, har bý- og bygdarráðslimir, kommunurstjóri og kommunuskrivarar luttaka saman við arbeiðsbólkinum. Hvussu, nær og hvar álitið skal leggjast fram fyri almenninginum má støða takast til.*

**Lógargrundarlag:**
- Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018
- Løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

Fundurin lokin kl. 20:05

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

~~Jónleyg Jespersen Bech~~

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Eyð Eidesgaard